# Asfaltera fyri tvær milliónir

*Vágs býráð fer at asfaltera báðar høvuðsvegirnar í summar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Vegirnir í Vági hava verið sera vánaligir, men nú er ætlanin at bøta uppá tað.

Á fundi mikukvøldið samtykti Vágs Býráð at fara undir umfatandi asfaltering í ár, eftir at tað í nógv ár bara hevur verið ráð til at lappa, har ábøtur hava verið harðast tiltrongdar.

Í seinastuni er eisini umfatandi kaðalarbeiðið gjørt í Vági, so mestsum ígøgnum allan býin er høvuðsvegurin uppgrivin og kaðalar hjá SEV og Føroya Tele niður lagdir niður í.

Tað arbeiðið er nú liðugt, so Býráðið heldur, at nú tað er klárt at asfaltera, er tað eisini neyðugt at tað verður gjørt.

Upprunaliga hevur Býráðið sett eina millión av til asfaltering í ár, men nýggjar metingar vísa, at arbeiðið fer at kosta nærri tveimum milliónum.

Ætlanin er at asfaltera allan Ovara Veg, umframt Niðara Veg frá vendiplássinum hjá Karl Olsen, vestur á Løghamar.

Samstundis er Landsverkfrøðingurin biðin um at koma suður at mála strikur í vegirnar.

Býráðið samtykti at fara undir arbeiðið og at taka kostnaðin til eftirtektar.

Ætlanin er at arbeiðið skal verða liðugt til Jóansøku, sum verður í Vági í ár.

Seinni er ætlanin at asfaltera allar hinar vegirnar í Vági so við og við.

# Valt tveir nevndarlimir

Vágs Býráð hevur nú valt sín nevndarlim í upptøkunevndina til eldrasambýlið, sum letur upp í Vági um ikki so langa tíð.

Býráðið valdi Ásgerð Stenberg og hon verður samstundis formaður í nevndini.

Fýra fólk verða í upptøkunevndini. Læknarnir, heimarøktarskipanin og heimasjúkrasystraskipanin velja hvør sín lim afturat.

Býráðið hevur eisini valt Páll Augustinussen í nevndina fyri Stóra Pakkhús á Gørðunum.

Í løtuni eru tað seks feløg í Vági, sum húsast í pakkhúsinum og tey hava flestøll tilknýti til sjógvin: Tey eru felagið Johanna, Grindabátafelagið, felagið Garðabrúgv, Kappróðrarfelagið, Nýggjársnevndin og Fornminnisfelagið.

Samstundis er ætlanin at gera Pakkhúsið til eitt sjósavn. Og nú hevur Býráðið stuðlað ætlanini við 72.000 krónur.

Nú eru feløgini í ferð við at skipa eina nevnd at arbeiða víðari við málinum og í tí sambandinum vilja feløgini eisini fegin hava ein býráðslim í nevndina

*–Áki–*

# Byggir pakkhús

Tað er ikki áræði, sum manglar í Vági. Eftir døpru kreppuna allan fyrrapartin av nítiárunum, eru síðani eitt virki fyri og annað eftir stovnað og fleiri virkisbygningar eru reistir niðri á keiini.

Og skjótt verður helst ein bygingur afturat reistur á keiini í Vági. Tað er hin blaðungi Arni D. Brattaberg, sum hevur søkt býráðið um byggiloyvi til eitt goymsluhús niðri á keiini og á fundi mikukøldið samtykti býráðið einmælt at ganga honum á møti.

Talan verður um eitt pakkhús, sum er 24x16 metrar og tað kemur at standa uttanfyri virkið hjá Palm Seafood. Ætlanin er at byggja eitt pakkhús til askyns endamál. Nevnt varð, at tað m.a. skuldi brúkast til at goyma salt og fiskakassar í.

*–Áki–*



*Krambúðin á Gørðunum í Vági er nú latin uppaftur við ektaðum natúrvørum frá Ullvirkinum í Vági*

# Hetta er sum at fara upp um eina gátt

*Ullvirkið í Vági hevur latið fyrsta handilin upp við ektaðum natúrvørum úr Føroyskari ull. Samstundis hevur føroyska ullin vakt ans uttanlands*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað eru nógvar gáttir at fara upp um í lívinum og hetta er ein av teimum.

Tað er væl skiljandi, at Karin Brattaberg heldur, at mikudagurin 16. februar 2000, er ein stórur dagur í hennara lívið.

Hendan dagin læt hon handil upp í Vági við vørum úr ektaðari, føroyskari ull, sum hvørki er litað, ella viðgjørd við øðrum evnum av nøkrum sum helst slag.

So meiri natúrligt, vistfrøðiligt og føroyskt kann tað ikki blíva.

Tann nýggi handilin kundi valla ligið betri fyri, tí hann er beint við høvuðsvegin í Vági í gomlu krambúðini á Gørðunum, sum sostatt aftur er komið til heiður og æru.

Ikki minst er tað stuttligt, at nógv av tí gamla innbúgvinum og tilfarinum er varðveitt, so at trína innaftur í krambúðina er ikki sørt av eini søguligari løtu.

So nú má sigast, at tað av álvara aftur er farið at koma lív í Garðarnar aftur, sum fyrr høvdu so ómetaligan týdning fyri vágbingar, tó at virksemið nú er øðrvísi, enn tað var fyrr.

Í gamla vaskikjallaranum er nú ullvirki, í gomlu krambúðini er nú sølubúð við vørum úr føroyskari ull og farið er av álvara at gera Stóra Pakkhús til ein mentanarmiðdepil í Vági, tí har skal bæði verða sjósavn, umframt tilhaldsstað hjá seks feløgum í Vági, sum øll hava tilknýti til sjógvin.

**Var ikki ætlanin**

Á teirri hugnaligu samkomuni, tá ið handilin læt upp, segði Árni Brattaberg, at tað var ongantíð ætlanin, at tey eisini skuldu hava sølubúð.

– Tá ið vit byrjaðu fyri hálvum triðja ári síðani, var ætlanin, at vit skuldu bara spinna tógvið, so skuldu onnur binda. Men tað var skjótt, at vit komu eftir, at skuldi gongd koma á, var neyðugt, at vit eisini fóru at virka ymisk pløgg burturúr.

– Tað hevur tó gingið so mikið seint at fáa gongd á søluna, at vit komu eftir, at vit eisini noyðast at hava sølubúð sjálvi.

Hann segði, at tann nýggi handilin í Vági tí er ein roynd at fáa meiri gongd á søluna. Seinni í vár verður farið eitt stig víðari, tí tá letur eisini ein handil upp í hjartanum á Havnini, í handlinum hjá Jóan Jakku í Vágsbotni, beint undir liðini á sjálvum Nólsoyar Pálli.

**Nýmótans snið**

Árni Brattaberg vísti á, at samstundis, sum hesin handilin letur upp, verður dúgliga arbeitt fyri at finna uppá ymsar vørur at gera burturúr teirri føroysku ullini.

Og møguleikarnir eru óendaligir. Umframt troyggjur í ymsum sniðum og longdum, kot, húgvur og turrikløð, eru tey nú eisini farin at gera sera snøggar og snotiligar taskur, og tað nýggjasta er buksur og kjólar úr føroyskari ull.

Av tí, at ullin er púra natúrlig, eru litirnir eisini avmarkaðir til hvítt, ljósa- og myrkagrátt, umframt til ljósa- og myrkamorreytt.

Og nú eru tey eisini farin at gera skjórut tógv, tað er tógv, har fleiri litir renna saman í ein.

Ektaðar natúrvørur eru hægsti móti og Árni Brattaberg fegnaðist um, at samstundis, sum tað gongur meiri strilti at fáa føroyingar at fylgja mótanum, er áhugin fyri framleiðsluni hjá ullvirkinum veksandi uttanlands.

Hann sigur m.a., at ein rættiliga kendur, norskur formgevari hevur biðið um tógv, sum hann so ætlar at gera ymisk pløgg burturúr í nýmótans sniði.

Royndir verða eisini sendar til føroyskar formgevarar í mótavinnuni uttanlands, eitt nú í Danmark og í Italia.

Og samstundis eru tað formgevarar í Føroyum, sum eru farnir at vísa „Føroya gulli“ ans.

Árni Brattaberg heldur eisini, at tað kanska verður líka nógv í útflutningsvinnuni, ar framtíðin hjá ullvirkinum liggur.

Hann sigur, at eitt nú tykist gongd verða komin á útflutningin til Noregs.

– Í farnu viku vóru tveir norðmenn á ullvirkinum og teir søgdu, at tann besta føroyska ullin er fult á hædd við tað norsku, men hon er bara so nógv sterkari.

Eitt sindur er eisini útflutt til Grønlands og Danmarkar.

Somuleiðis verður ullvirkið við á stórari framsýning undir heitinum „Villmarksliv“ í skoytuhøllini í Hamar í Noregi í døgunum 7.-9. apríl.

**Fegnast um tiltakið**

Á samkomuni í Vági mikudagin vóru eisini umboð fyri Ferðaráðið, Hendur og hugflog Vágs Býráð, fíggingarstovnar, økisgranskingardepilin og onnur.

Umboðið fyri ferðaráðið helt, at tað var harðliga tiltrongt at fáa eitt stað, sum Ferðaráðið við góðar samvitsku kundi vísa ferðafólki til at fáa tað ektaðu vøruna.

Ólavur Waag Høgnesen frá økisdeplinum segði, at størsti týdningurin fyri at menna útjaðaran var at seta tiltøk í verk, sum høvdu rót á staðnum, at tað júst hetta tiltakið eitt dømi um.

Hann vónaði at hetta kundi fara at geva vágbingum og føroyingum nakað.

Men hann helt eisini, at hetta kundi eisini verða eitt ískoyti til menning aðrastaðni, tí granskingargardepilin fer sjálvsagt at fortelja øðrum um hesar royndirnar, eins og depilin kann fortelja føroyingum, hvat tað er, sum ger, at menningarætlanir aðrastaðni eydnast- ella miseydnast, segði hann.



HYGG & HOYR

Fríggjadagur 18. februar

# Miðsavnan ella -spjaðing

*Uttan at tosa ella hugsa alt ov nógv um omanfyristandandi yvirskrift, fór Fróði Løkságarð í holt við at framleiða eina sending, sum hóast alt nertur við evnið*

JÁKUP MØRK

Seinastu mongu árini hevur mangan verið havt á lofti, hvussu torført tað er hjá útjaðaranum at mennast, tí so at siga alt alment virksemi verður miðsavnað í Havn.

Í hesum sambandi eru loftmiðlar okkara heldur ikki slopnir undan tosinum, og fleiri eru tey, sum hava funnist at, at hesir hava alt sítt virksemi í høvuðsstaðnum.

**Gjørd í Klaksvík**

Hetta er tó ikki galdandi longur, tí síðani apríl mánað í farna ári, hevur ein sending verið á skránni, sum ikki er framleidd í Havn. Talan er um væl umtóktu tónleikasendingarnar hjá Fróða Løkságarð, sum undir heitinum »Alpha Proxima«, verða varpaðar út til lurtararnar hvørt leygarkvøld. Sendingarnar verða nevnliga gjørdar í Studio Pegasus í Klaksvík, og verða síðani sendar til Havnar, haðani tær verða varpaðar út.

Tá vit spurdu Fróða, hvussu tað bar til, at júst henda sendingin verður framleidd í Klaksvík, svaraði hann, at kanska var meira av tilvild enn nøkrum øðrum.

- Onkur var, sum fekk hetta hugskotið, og so fóru vit bara í gongd, sigur Fróði, sum eisini leggur afturat, at hann eisini heldur tað vera av tilvild, at tað bert er tann eina sendingin, sum verður framleidd uttan fyri høvuðsstaðin.

Eftir hansara tykki kundi henda sending akkurát tað sama verið framleidd í Sortudíki, men hinvegin er einki til hindurs fyri, at fleiri enn tann eina sendingin hjá Útvarpinum kundu verið framleiddar aðrastaðni, eitt nú í Klaksvík.



**Frítíðarítriv**

Sum nevnt, so hevur Fróði nú í einar 10 mánaðir havt ábyrgd av hesi sendingini, og sjálvur heldur hann tað bara vera heilt stuttligt at gera eina slíka sending. Hann leggur tó afturat, at hann sum so ikki hevur nakrar víðari ambitiónir í so máta.

Fyri hann er talan bert um eitt frítíðarítriv, sum hann tekst við av berum áhuga.

Eitt frítíðarítriv har hann saman við tøkninginum, Andrias Sundskarð, hevur møguleikan at lurta eftir tónleiki av øllum slag, umframt at lurtarin eisini verður væl kunnaður um tað menning, sum í farnu árum hevur verið í tónasøguni.

ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Saman at halda



Steintór Rasmussen, lærari, skrivar

Mikudagur. Pástandir og skuldsetingar flúgva gjøgnum luftina. Væl meiri enn hinir dagarnir hava at bjóða uppá.

Ikki minst hendan kalda og klára dagin í februar. Sjónvarpstólið hevur ein part av degnum verið brúkt sum eitt yvirvaksið lurtitól til orðaskiftið á tingið. Vit verða so líðandi upphitaði at hoyra fimmaran. Ivi, illgitingar og mistreysti. Góðir spurningar og framløgur villast inn í mjørkatos.

Vit føroyingar verða skjótt heimsmeistarar í at trætast og keglast. Vit klára at verða ósamd í nærum øllum viðurskiftum. Er ætlanin í lagi, so er tíðspunktið skeivt. Er tað ikki uppskotið, so er tað mannagongdin. Vil ein nýskipanir á einum økið, so skal hetta ikki lata seg gera. Og lata vit standa til, so er tað ábyrgdarleyst.

Ájú hendan dagin vóru tað løgtingslimirnir, sum hitaðu upp til 5 aran, sum Sigmar Bláberg enn einaferð legði tilrættis. Evnið var skipaði barnaansingin, sum eftir ætlan skal leggjast út til kommunurnar.

**Einki samstarv**

Hóast konufólk saktans kunnu klandrast og taka harðliga til orðanna, so var tónin í sendingin munandi penari, enn tá nakrir av landsins fremstu monnum brúktu formannin í búskaparnevndini til skotskivu herfyri.

Havsins ríkidømi, okkara tilfeingi og lívsgrundarlag, ella børnini, tann føroyska framtíðin. Ikki sleppa vit undan ymsum meiningum um hvussu tingini skulu skipast, men kravið til okkum sjálvi má vera eitt minstamark av sakligheit og virðing fyri øðrum hugsanum. 5 arin kom væl frá uppgávuni, men kanska eisini tí at penalið ikki fyrilitarleyst trumlaði, sum vit onkuntíð uppliva á hesum kjakpalli.

Men meiri orðadráttur var á skránni!

Sjónvarpið og útvarpið plaga, tilvitað ella ikki, at hava sama mál á skránni mikudagar. Stovnarnir skuldu víst til hvønn annan og meira medvitað samstarvað um dagsins mál, tí klokkan átta um kvøldið hevði Krosskast eisini nýggju barnagarðslógini uppi at venda.

Sendingin var áhugaverd, og hóast ta vanligu mistrúnna til tað arbeiðið, ið onnur leggja fram, so var tónin ikki hatskur og óneyðuga persónligur. Gjøgnum ymsar meiningar búnast og mennist eitt mál, men tað, sum serliga ríkaði hyggjaran hesa løtuna, var, at upptøkutólini komu rættuliga víða um. Kanska vóru fleiri føroyskar myndir at síggja enn í einari vanligari tíðindasending. Vitjað var bæði á barnagørðum á Argjum og í Kvívík. Børn, foreldur, pedagogar og rektari sluppu eisini framat í sendingini.

**Samhald má vera**

Aftaná at hava hoyrt politiskt orðaskiftið, fimmara og krosskast kann ein spyrja, hvat víðari fer at spyrjast burturúr. Og hugstoytt er helst at ásanna, at ósemjur helst stinga sera djúpt her á landi. Sum Hans A. Djurhuus yrkti fyri skjótt einari øld síðani: Saman at halda varð ei okkum givið, tí er so lítið burturúr her blivið, tí enn vit tala, men ov lítið gera. Samhald má vera!

Annars var tað hugaligt at síggja tveir føroyskar stuttfilmir sama kvøldið. Jú, eg haldi at vit eru ikki so galin kortini. Og Øssur Egholm hevur sett dám á kvøldið við sendingini Sneisuni, sum eg haldi hevur bitið seg fasta sum ein góður fastur táttur hjá útvarpinum.

Rás 2 og Lindin hoyrast framvegis bert í pørtum av landinum. Fríggjamorgunin hoyrdi eina sending í Rás 2, har tosað við nøkur línuskip, sum royndu undir Føroyum.

Prátað varð um fiskiskap, um prísir, hvussu viðraði o.s.fr. Avgjørt bæði nýskapandi og ikki so lítið krevjandi. Tað er gott at fólk her á landi framvegis vilja bróta upp um ermar.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN